# Almannamálaráðið

**Løgtingið**

Dagfesting: 1. september 2020
Mál nr.: 20/00735
Málsviðgjørt: MM
Eftirkannað: 26. august 2020

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.**
(COVID-19, dagpeningur vegna sóttarhald, dagpeningur til fólkapensjonistar, endurgjald til arbeiðsgevara, víðkaður rættur til sjálvstøðug vinnurekandi o.a.)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.**
(COVID-19, dagpeningur vegna sóttarhald, dagpeningur til fólkapensjonistar, endurgjald til arbeiðsgevara, víðkaður rættur til sjálvstøðug vinnurekandi o.a.)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai 2001 um dagpening vegna sjúku v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 130 frá 14. august 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Aftan á § 2, men áðrenn yvirskriftina yvir § 3, verður sett:

"**§ 2 a.** Dagpeningur verður veittur persóni, sum er settur í sóttarhald av heilsumyndugleikunum, ella sum heilsumyndugleikarnir hava mælt til at fara í sóttarhald orsakað av COVID-19.
*Stk. 2.* Hóast ásetingina í § 4 kann persónur, sum hevur fingið tillutað fólkapensjón ella er fyltur 70 ár, og sum hevur fingið staðfest COVID-19, av heilsumyndugleikunum er settur í sóttarhald, ella sum heilsumyndugleikarnir hava mælt til at fara í sóttarhald orsakað av COVID-19, fáa dagpening.
*Stk. 3.* Dagpeningaupphæddin sbrt. stk. 2 verður roknað eftir § 8, stk. 1-3 og § 9, stk. 1 og 3, tó í mesta lagi 500 kr. um dagin, íroknað frítíðarløn.
*Stk. 4.* Eftirlønargjald verður ikki lagt aftrat dagpeningi sbrt. stk. 2.

*Afturrindanarskipan fyri privatar arbeiðsgevarar*

**§ 2 b.** Hóast § 2, stk. 3 og § 3, stk. 1 kann privatur arbeiðsgevari fáa afturrindaðar tær lønarútreiðslur, ið standast av, at starvsfólk, sum hevur rætt til løn undir sjúku, men annars lýkur vanligu treytirnar í hesi løgtingslógini, hevur fingið staðfest

COVID-19, av heilsumyndugleikunum er sett í sóttarhald, ella heilsumyndugleikarnir hava mælt til at fara í sóttarhald orsakað av COVID-19.
*Stk. 2.* Hóast ásetingina í § 4, er persónur, sum hevur fingið tillutað fólkapensjón ella er fyltur 70 ár, fevndur av ásetingini í stk. 1.
*Stk. 3.* Upphæddin, sum verður afturrindað sbrt. stk. 1, verður roknað eftir § 8, stk. 1-3. Afturgjaldið er í mesta lagi tann upphædd, sum starvsfólkið vildi havt rætt til sbrt. § 9, um viðkomandi leyk treytirnar um rætt til dagpening eftir hesi løgtingslóg. Hjá mánaðarløntum kann arbeiðsgevari nýta seinast útgoldnu mánaðarlønina sum inntøkugrundarlag sbrt. § 8, stk. 1.
*Stk. 4.* Upphæddin, sum verður afturrindað sbrt. stk. 2, verður roknað eftir § 8, stk. 1-3. Afturgjaldið er í mesta lagi 500 kr. um dagin, íroknað frítíðarløn.
*Stk. 5.* Afturgjaldið sbrt. stk. 2 fevnir ikki um eftirlønargjald.
*Stk. 6.* Afturrindan sbrt. stk. 1 og 2 fevnir ikki um starvsfólk, sum heilt ella lutvíst kunnu røkja arbeiðið heimanífrá."

**2.** Aftan á § 10 verður í kapittul 5 sett:

"**§ 10 a.** Verður umsókn um afturrindan sbrt. § 2 b móttikin á Almannaverkinum í seinasta lagi 90. dagin aftaná 1. fráverudag, kann afturrindan játtast frá og við 1. fráverudegi.
*Stk. 2.* Verður umsóknin móttikin á Almannaverkinum seinni enn ásett í stk. 1, kann afturrindan bert játtast frá móttøkudegnum."

**3.** Aftan á § 17, men áðrenn yvirskriftina yvir § 18, verður sett:

"**§ 17 a.** Um frávera er orsakað av viðurskiftum, sum viðvíkja COVID-19, sbr. § 2 a, stk. 1, fær persónur, hóast §§ 16 og 17, stk. 1, rætt til dagpening dagin eftir, at umsókn um upptøku í sjálvbodnu tryggingina er latin inn."

**4.** Aftan á § 20 verður sett:

"**§ 20 a.** Dagpeningur veittur sbrt. §§ 2 a og 2 b er undantikin kravinum um afturrindan sbrt. § 20, stk. 2."

**5.** Aftan á § 23 a verður sett:

"**§ 23 b.** Við staðfesting av COVID-19 ella við óarbeiðsføri sbrt. §§ 2 a og 2 b er váttan frá arbeiðsgevara javnsett við læknaváttan. Í førum, har Almannaverkið metir tað neyðugt, kann læknaváttan krevjast."

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. september 2020. Landsstýrismaðurin kann seta løgtingslógina úr gildi við kunngerð.
*Stk. 2.* Umsóknir sbrt. hesi løgtingslóg, sum eru fyri tíðarskeiðið frá 1. september 2020 til hendan løgtingslóg fer úr gildi, men sum ikki eru Almannaverkinum í hendi ella ikki eru liðugt viðgjørdar, áðrenn løgtingslógin fer úr gildi, verða viðgjørdar sbrt. reglunum í hesi løgtingslóg.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið
Løgtingslóg nr. 130 frá 14. august 2020 fór við sólseturáseting úr gildi tann 31. august 2020.

Løntakarar í sóttarhaldi og arbeiðandi fólkapensjonistar hava tí ikki longur rætt til dagpening vegna sjúku, eins og skipanin við afturrindan av lønarútreiðslum til arbeiðsgevarar á privata arbeiðsmarknaðinum er farin úr gildi. Á sama hátt eru linkaðu treytirnar í sambandi við COVID-19 til sjálvstøðug vinnurekandi eisini farnar úr gildi.

COVID-19 er tó ikki hasað av, og hóast minking er í tali av smittaðum, eru fólk enn sjúk og í sóttarhaldi. Fyri at minka um avleiðingarnar fyri borgarar og vinnulív og fyri at fyribyrgja, at persónar fara at bróta sóttarhaldið, er neyðugt at seta í gildi aftur reglurnar í dagpengalógini í sambandi við COVID-19 farsóttina.

Talan er um somu ásetingar sum løgtingslóg nr. 24 frá 18. mars 2020, løgtingslóg nr. 42 frá 7. apríl 2020, umframt løgtingslóg nr. 130 frá 14. august 2020.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Hetta uppskotið hevur við sær fleiri ymiskar broytingar. Tær ymsu broytingarnar verða lýstar hvør sær niðanfyri.

*1.2.1. Dagpeningur veittur í sambandi við sóttarhald*
Dagpeningur sambært løgtingslóg um dagpening vegna sjúku verður veittur løntakara, sum er óarbeiðsførur vegna sjúku. Dagpeningalógin hevur onga áseting um rætt til sjúkradagpening, tá talan er um sóttarhald eftir tilmæli frá heilsumyndugleikunum.

*1.2.2. Rættindi til persónar á privata arbeiðsmarknaðinum, sum blíva sjúkir ella skulu í sóttarhald*
Dagpeningur sambært løgtingslóg um dagpening vegna sjúku verður veittur teimum, sum missa inntøku orsakað av sjúku. Dagpeningur verður tó ikki veittur teimum, sum sambært lóg, trygging ella sáttmála, frá arbeiðsgevara ella øðrum hava rætt til løn undir sjúku.

Ein týðandi partur av føroysku løntakarunum hevur sbrt. løgtingslóg um starvsmenn ella sambært sáttmála rætt til løn undir sjúku – uttan mun til longdina av sjúkuskeiðnum. Arbeiðsgevari kann tó siga starvsmanni úr starvi við einum mánaðar freist, tá viðkomandi hevur verið sjúkur í tilsamans 120 dagar í einum 12 mánaða skeiði, um hetta er fyrisett í skrivligum sáttmála í einstøkum tænastuviðurskiftum.

Um nógvir løntakarar fáa COVID-19 smittu ella verða settir í sóttarhald, kann tað fáa týðandi fíggjarligar avleiðingar fyri privatu vinnuna og starvsfólk í privatu vinnuni.

*1.2.3. Bíðitíð í sambandi við útgjald frá sjálvbodnari trygging*
Sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar í egnum feløgum kunnu tekna trygging og harvið fáa dagpening frá fyrsta fráverudegi. Tó er ásett, at rætturin til dagpening tekur við 4 vikur eftir, at umsókn um sjálvbodna trygging er latin Almannaverkinum. Ásett er eisini, at umsókn um trygging ikki kann latast inn, um tryggingartakarin er óarbeiðsførur.

Ásetingarnar um bíðitíð og um óarbeiðsføri, tá umsóknin er latin inn, hevur við sær, at sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar í egnum feløgum, sum ikki eru tryggjaðir frammanundan, sannlíkt ikki lúka treytirnar at fáa útgjald í sambandi við COVID-19.

*1.2.4. Afturrindan fyri 1. og 2. fráverudag*

Løntakari hevur rætt til dagpening frá 1. fráverudegi. Almannaverkið rindar sostatt dagpening beinleiðis til løntakara frá fyrsta degi, at viðkomandi er sjúkur. Tó er ásett í lógini, at arbeiðsgevari afturrindar útreiðslur fyri 1. og 2. fráverudag. Hetta verður gjørt soleiðis, at Almannaverkið sendir krav til arbeiðsgevara um at afturrinda dagpening fyri 1. og 2. fráverudag.

*1.2.5. Dagpeningur til fólkapensjonistar*

Í viðmerkingunum til hetta uppskotið verður skilt ímillum gamla pensjón og nýggja pensjón. Pensjónsnýskipanin kom í gildi 1. januar 2020 og er galdandi fyri nýggjar pensjonistar. Hetta verður kallað nýggj pensjón. Tey, sum vóru pensjonistar áðrenn 1. januar 2020, fáa gamla pensjón.

Fólkapensjónin er at meta sum kompensatión fyri ikki longur at vera á arbeiðsmarknaðinum og skal tryggja fólki støðuga inntøku á ellisárum. Hetta er eisini orsøkin til, at fólkapensjonistar ikki eru fevndir av vanligu arbeiðsmarknaðarskipanunum, herundir løgtingslóg um dagpening vegna sjúku.

Tað eru gott 8300 fólkapensjonistar, harav tey uml. 8200 fáa gamla pensjón. Hesi fáa, uttan mun til inntøku annars, altíð útgjald frá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum, AMEG, og grundupphæddina í fólkapensjónini. Tey, sum arbeiða og hava inntøkur, kunnu missa viðbótina ella part av viðbótini. Viðbótin er uml. 25-30% av samlaðu pensjónini (AMEG + fólkapensjón).

Hjá teimum, sum fáa nýggja pensjón, verður mótroknað í bæði grundupphædd og viðbót. Mótroknað verður fyrst í grundupphæddini og síðani viðbótini. Enn eru bert uml. 100 persónar, sum fáa nýggja pensjón, og av teimum er ein lítil partur, sum hava somikið høga inntøku, at grundupphæddin er fult mótroknað, og móttaka tey sostatt einans lutvísa viðbót (umframt útgjald frá AMEG).

Fólkapensjonistar, sum arbeiða, móttaka útgjald frá AMEG og lutvísa fólkapensjón og gjalda ikki arbeiðsmarknaðargjøld (barsilsskipan, ALS og til AMEG). Sostatt eru fíggjarligu treytirnar hjá fólkapensjonistum, sum arbeiða, munandi betri enn hjá løntakarum, sum ikki eru pensjonistar. Men um arbeiðsinntøkan dettur burtur í eitt fyribils tíðarskeið vegna sjúku ella vegna arbeiðsloysi, so er løntakarin tryggjaður umvegis dagpeningaskipanina hjá Almannaverkinum ella ALS. Fólkapensjonisturin hevur ikki rætt til hesar veitingarnar, júst tí hann fær fólkapensjón.

Talvurnar niðanfyri vísa, hvussu inntøkan aftaná skatt og øll tvungin gjøld broytist, um ein persónur er fyri inntøkumissi í ein mánað vegna sjúku. Løntakarin í talvunum fær dagpening, tá inntøkan dettur burtur, meðan fólkapensjonisturin missir arbeiðsinntøkuna og hevur pensjón eftir.

**Gomul pensjón**

| Arbeiðsinntøka um árið | Løntakari - ikki fólkap. Í arbeiði Inntøka eftir skatt og gjøld um mán. | Tá arb. innt. dettur burtur í ein mán. (2) | Ógiftur fólkap. Í arbeiði Inntøka eftir skatt og gjøld um mán. | Tá arb. innt. dettur burtur í ein mán. | Giftur fólkap. (1) Í arbeiði Inntøka eftir skatt og gjøld um mán. | Tá arb. innt. dettur burtur í ein mán. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 0 | | | 11.900 | 11.900 | 10.300 | 10.300 |
| 100.000 | 5.900 | 5.900 | 16.000 | 10.150 | 14.700 | 8.800 |
| 200.000 | 10.800 | 10.800 | 20.050 | 9.000 | 18.750 | 8.500 |
| 300.000 | 15.400 | 11.500 | 24.075 | 8.000 | 23.200 | 8.000 |
| 400.000 | 19.600 | 11.500 | 28.550 | 8.000 | 27.925 | 8.000 |

*(1) Dømið er pensjonistur uttan mótrokning millum hjúnafelagar. Hevði dømið verið við mótrokning, og hjúnafelagin ikki hevur inntøku, eru upphæddirnar nakrar 100 kr. hægri.*
*(2) Inntøkan kann vera eitt sindur hægri ella eitt sindur lægri, treytað av hvussu nógvir arbeiðsdagar eru í mánaðinum. Frítíðarløn kemur aftrat upphæddunum.*
*Hjá pensjonistum er hædd ikki tikin fyri møguligum útgjaldi frá privatari pensjón ella tvungnari uppsparing*
*Fyrivarni skal takast fyri upphæddum eftir skatt, tí skattaviðurskiftini hjá tí fólki eru ymisk.*

**Nýggj pensjón**

| Arbeiðsinntøka um árið | Løntakari - ikki fólkap. Inntøka eftir skatt og gjøld | Tá arb. innt. dettur burtur í ein mán. (1) | Ógiftur fólkap. Tøk innt. um mán. | Tá arb. innt. dettur burtur í ein mán. | Giftur fólkap. Tøk innt. um mán. | Tá arb. innt. dettur burtur í ein mán. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 0 | | | 11.900 | 11.900 | 10.300 | 10.300 |
| 100.000 | 5.900 | 5.900 | 16.300 | 10.600 | 14.700 | 8.900 |
| 200.000 | 10.800 | 10.800 | 19.600 | 8.500 | 18.000 | 8.500 |
| 300.000 | 15.400 | 11.500 | 22.500 | 6.900 | 21.300 | 5.000 |
| 400.000 | 19.600 | 11.500 | 25.850 | 4.700 | 24.700 | 4.000 |

*(1) Inntøkan kann vera eitt sindur hægri ella eitt sindur lægri, treytað av hvussu nógvir arbeiðsdagar eru í mánaðinum. Frítíðarløn kemur aftrat upphæddunum.*
*Hjá pensjonistum er hædd ikki tikin fyri møguligum útgjaldi frá privatari pensjón ella tvungnari uppsparing*
*Fyrivarni skal takast fyri upphæddum eftir skatt, tí skattaviðurskiftini hjá tí fólki eru ymisk.*

Talvurnar omanfyri vísa sum nevnt, hvussu tøka inntøkan broytist, tá persónur við støðugari arbeiðsinntøku, missir arbeiðsinntøkuna í ein mánað. Dettur inntøkan burtur í meira enn ein mánað, hækkar tøka inntøkan nakað, tí at lutfalsliga upphæddin, sum verður rindað í skatti, lækkar. Í talvunum omanfyri er hædd ikki tikin fyri, at ein pensjonistur, sum missir sína arbeiðsinntøku, fær rætt til hægri fólkapensjón. Hetta hendir tó ikki sjálvvirkandi beinanvegin uttan so, at pensjonisturin fyri Almannaverkinum ger vart við, at pensjónin skal ásetast av nýggjum. Tá árið er farið afturum, verða pensjónir eftirroknaðar, og ein fólkapensjonistur fær afturgoldið upphæddina, sum hann hevur fingið ov lítið í pensjón.

Persónar, sum hava útsett pensjónina, fáa ikki fólkapensjón og hava tí rætt til dagpening vegna sjúku.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Yvirskipaða endamálið er at bøta um avleiðingarnar av COVID-19 fyri privatu vinnuna, sjálvstøðug vinnurekandi, løntakarar og fólkapensjonistar. Tær broytingarnar, sum verða framdar í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku, verða lýstar niðanfyri.

*1.3.1. Dagpeningur veittur í sambandi við sóttarhald*

Persónur, sum fer í sóttarhald, fer at fáa rætt til dagpening vegna sjúku. Endamálið er at fyribyrgja sosialum avleiðingum og at fyribyrgja, at løntakarar aftra seg við at fara í sóttarhald.

Hetta lógaruppskotið hevur við sær, at dagpeningur vegna sjúku, umframt at verða veittur í sambandi við sjúku, eisini verður veittur, tá persónur er í sóttarhaldi í sambandi við COVID-19. Hetta merkir, at persónur, sum av heilsumyndugleikunum er settur í sóttarhald, og persónur, sum heilsumyndugleikarnir hava mælt til at fara í sóttarhald, eisini fær rætt til dagpening vegna sjúku.

Fyri at fyribyrgja, at heilsuverkið í hesum komandi tíðarskeiðinum verður lagt undir eyka trýst, verður treytin um læknaváttan, sum annars altíð skal fáast til vegar í sambandi við dagpening, ikki galdandi fyri mál, ið viðvíkja COVID-19. Í hesum málum verður ein váttan frá arbeiðsgevara javnsett við læknaváttan. Almannaverkið kann tó biðja um læknaváttan, um tað verður mett neyðugt.

*1.3.2. Rættindi til persónar á privata arbeiðsmarknaðinum, sum blíva sjúkir ella skulu í sóttarhald*

Starvsfólk á privata arbeiðsmarknaðinum hava í nógvum førum rætt til løn undir sjúku. Hetta verður eisini galdandi frameftir. Men fyri at bøta um avleiðingarnar av COVID-19 á privata arbeiðsmarknaðinum, fara arbeiðsgevarar, sum rinda løn til persónar, sum eru smittaðir við COVID-19, at fáa lønarútreiðslurnar afturrindaðar frá Almannaverkinum. Tó verður í mesta lagi afturrindað ein upphædd svarandi til tað, sum løntakarin hevði havt rætt til, um hann leyk treytirnar í lógini um dagpening vegna sjúku.

Eisini fáa arbeiðsgevarar afturrindað lønarútreiðslur til persónar, sum eru í sóttarhaldi orsakað av COVID-19. Skipanin við afturrindan verður galdandi fyri persónar, sum av heilsumyndugleikunum eru settir í sóttarhald, og persónar, sum heilsumyndugleikarnir hava mælt til at fara í sóttarhald.

Løgtingslóg um dagpening vegna sjúku fevnir um løntakarar, sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar í egnum feløgum. Stjórar eru ikki at rokna sum løntakarar og eru tí undir vanligum umstøðum ikki fevndir av lógini. Tó hevur hetta lógaruppskotið við sær, at skipanin við afturrindan til privatar arbeiðsgevarar eisini fevnir um lønarútreiðslu til stjórar, sum ikki fáa arbeitt orsakað av COVID-19 smittu ella sóttarhaldi.

Eins og hjá persónum, sum fáa dagpening vegna sjúku í sambandi við COVID-19, verður ein váttan frá arbeiðsgevara javnsett við læknaváttan.

*1.3.3. Bíðitíð í sambandi við útgjald frá sjálvbodnari trygging*

Fyri at bøta um avleiðingarnar fyri sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar í egnum feløgum av COVID-19, verða treytirnar linkaðar í sambandi við útgjald frá sjálvbodnu tryggingini.

Sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar í egnum feløgum, sum í dag hava eina bíðitíð á 4 vikur, frá at umsókn um trygging er latin Almannaverkinum, til rættur til dagpening tekur við, fáa í sambandi við COVID-19 rætt til útgjald dagin eftir, at umsókn er latin Almannaverkinum.

Eisini verður treytin, at persónur skal vera arbeiðsførur fyri at kunna søkja um trygging, ikki galdandi fyri COVID-19 smittu ella sóttarhald. Tað merkir, at persónur, sum er smittaður ella er í sóttarhaldi, kann søkja og fáa útgjald dagin eftir, at umsóknin er latin Almannaverkinum.

Vanligu heilsutreytirnar skulu tó framvegis vera uppfyltar fyri at kunnu tekna trygging. Tað merkir, at persónur, sum av øðrum orsøkum enn COVID-19 ikki er arbeiðsførur, ikki kann tekna trygging sambært løgtingslóg um dagpening vegna sjúku.

*1.3.4. Afturrindan fyri 1. og 2. fráverudag*
Arbeiðsgevari, sum hevur starvsfólk, sum er smittað við COVID-19 ella er í sóttarhaldi, og sum tí fær dagpening vegna sjúku, skal ikki afturrinda landskassanum útreiðslur, sum standast av 1. og 2. fráverudegi. Endamálið er at bøta um avleiðingarnar av COVID-19 smittuni.

*1.3.5. Dagpeningur til fólkapensjonistar*
Við uppskotinum verður fyribyrgt, at fólkapensjonistur er fyri brádligum inntøkumissi, um hann hevur fingið staðfest COVID-19, er settur í sóttarhald, ella tá heilsumyndugleikarnir hava mælt honum til at fara í sóttarhald.

Fólkapensjonistur fer tó ikki at fáa rætt til somu upphædd, sum løntakari, ið ikki er fólkapensjonistur. Fólkapensjonistar, sum arbeiða, hava sum nevnt omanfyri munandi betri fíggjarligar treytir enn aðrir løntakarar. Ein løntakari, sum fær hægst møguliga útgjald frá dagpeningaskipanini, hevur umleið 11.900 kr. um mánaðin aftaná skatt og øll tvungin gjøld. Um ein ógiftur fólkapensjonistur hevði fingið somu upphædd frá dagpeningaskipanini, hevði inntøkan eftir skatt og gjøld verið umleið 20-21.000 kr. um mánaðin. Hetta svarar til eina lønarinntøku hjá ikki-pensjonisti uppá umleið 35-36.500 kr. um mánaðin.

Meginreglan í dagpeningaskipanini er, at dagpeningur verður veittur fyri fullan lønarmiss tó í mesta lagi 80% av løn sambært sáttmála millum Føroya arbeiðarafelag og Føroya arbeiðsgevarafelag, svarandi til 960 kr. um dagin (íroknað frítíðarløn). Meginreglan verður tann sama fyri fólkapensjonistar, tó verður hægsti dagpengasatsur settur til 500 kr.

Lógaruppskotið fer at hava við sær, at fólkapensjonistar, sum arbeiða, og sum missa arbeiðsinntøku orsakað av COVID-19, í minsta lagi hava eina tøka inntøku, sum er á hædd við tað, sum fólkapensjonistar fáa, sum onga aðra inntøku hava. Flestu pensjonistar fara at hava eina hægri inntøku enn fulla fólkapensjón.

Víst verður eisini til talvu fyri nýggja og gamla pensjón undir broti 1.2.5.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Uppskotið hevur við sær fimm ymiskar broytingar.

*1.4.1. Dagpeningur veittur í sambandi við sóttarhald*
Dagpeningur vegna sjúku verður eisini veittur, tá persónur av heilsumyndugleikunum er settur í sóttarhald ella heilsumyndugleikarnir hava mælt til at fara í sóttarhald.

*1.4.2. Rættindi til persónar á privata arbeiðsmarknaðinum, sum blíva sjúkir ella skulu í sóttarhald*

Arbeiðsgevarar á privata arbeiðsmarknaðinum, sum hava skyldu at rinda løn undir sjúku, fáa afturrindað lønarútreiðslur til persónar, sum eru smittaðir við COVID-19, og til persónar, sum av heilsumyndugleikunum eru settir í sóttarhald, ella heilsumyndugleikarnir hava mælt til at fara í sóttarhald. Arbeiðsgevarin fær afturrindað eina upphædd svarandi til tað, sum løntakarin hevði havt rætt til sambært lógini um dagpening vegna sjúku, um hann leyk treytirnar fyri tí.

*1.4.3. Bíðitíð í sambandi við útgjald frá sjálvbodnari trygging*

Sjálvstøðug vinnurekandi og stjórar í egnum feløgum, kunnu í sambandi við COVID-19 fáa útgjald frá sjálvbodnari trygging dagin eftir, at umsókn um trygging er latin Almannaverkinum. Persónur kann søkja um trygging og fáa rætt til útgjald, hóast hann er óarbeiðsførur, um óarbeiðsførið skyldast COVID-19.

*1.4.4. Afturrindan fyri 1. og 2. fráverudag*

Arbeiðsgevari skal ikki afturrinda landskassanum dagpening, tá fráveran skyldast COVID-19.

*1.4.5. Dagpeningur til fólkapensjonistar*

Fólkapensjonistur, sum er fyri inntøkumissi, tí hann er smittaður við COVID-19 ella settur í sóttarhald, fær rætt til dagpening vegna sjúku.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Føroyski arbeiðsmarknaðurin er í eini bráðfeingis støðu, og neyðugt er við broytingum, sum skulu setast í verk alt fyri eitt, og tí hevur uppskotið ikki verið til ummælis. Talan er um somu ásetingar sum, løgtingslóg nr. 24 frá 18. mars 2020, løgtingslóg nr. 42 frá 7. apríl 2020 og løgtingslóg nr. 130 frá 14. august 2020. Hesar lógarbroytingar vórðu gjørdar í samstarvi við Almannaverkið.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað ber ikki til at siga, hvussu COVID-19 ávirkar arbeiðsmarknaðin. T.v.s., hvussu nógvir løntakarar fara at verða smittaðir, og hvussu nógvir løntakarar fara í sóttarhald, og sostatt ber heldur ikki til at meta um fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan.

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Fyri landið er talan um beinleiðis útreiðslur á § 12 almannamál. Uppskotið tryggjar, at skattainntøkurnar hjá landi og kommunum í ein ávísan mun verða varðveittar, hóast virksemið í samfelagnum minkar.

Dagpeningur, sum verður veittur, svarar til mistu inntøkuna, tó í mesta lagi 80% av løn sambært sáttmála millum Føroya arbeiðsgevarafelag og Føroya arbeiðarafelag. Dagpeningur er tí í mesta lagi uml. 960 kr. um dagin, svarandi til 4.799 kr. um vikuna. Mánaðarliga gjaldið er treytað av, hvussu nógvir arbeiðsdagar eru í einum mánað. Í september mánað eru 22 arbeiðsdagar, og tá er hægst møguliga útgjaldið góðar 21.000 kr. (íroknað frítíðarløn) Harumframt skal landskassin rinda arbeiðsmarknaðargjøld og bundna eftirlønargjaldið sambært løgtingslóg um eftirlønir. Arbeiðsmarknaðargjøld og eftirlønargjald fyri hægstu dagpeningaveiting er uml. 2.000 kr. um mánaðin.

Útreiðslan hjá landskassanum til dagpening til ein persón, sum fær fullar dagpengar, er sostatt uml. 23.000 kr. um mánaðin.

Vegleiðandi kann vera víst á, at útreiðslur til COVID-19 endamál sambært dagpeningalógini undir sokallaðu fyrru bylgju vóru uml. 5,5 mió. kr.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Broytingarnar eru framdar í verandi lóggávu, og í stóran mun kunnu somu mannagongdir brúkast, sum vórðu settar í verk við lógarbroytingum frá fyrr í 2020.

Uppskotið hevur ikki við sær umsitingarligar avleiðingar fyri kommunurnar.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur við sær, at privata vinnan fær afturrindað ella lutvíst afturrindað lønarútreiðslur til starvsfólk, sum eru smittað við COVID-19, og lønarútreiðslur til persónar, sum eru farnir í sóttarhald orsakað av COVID-19. Uppskotið bøtir sostatt um avleiðingarnar, sum COVID-19 hevur við sær fyri privatu vinnuna. Uppskotið léttir somuleiðis um hjá sjálvstøðugum vinnurekandi, sum við hesum uppskoti fáa rætt til útgjald dagin eftir, at trygging er teknað.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Lógaruppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri persónar, sum eru fevndir av lógini um dagpening vegna sjúku. Lógaruppskotið heimilar at veita dagpening vegna sjúku til persónar, sum fara í sóttarhald.

Eisini persónar í privatu vinnuni hava við hesum lógaruppskoti størri sannlíkindi at varðveita sítt arbeiðspláss.

Uppskotið hevur somuleiðis jaligar avleiðingar fyri fólkapensjonistar, sum arbeiða. Flestu fólkapensjonistar verða tryggjaðir eina inntøku svarandi til fulla fólkapensjón, hóast ein møgulig arbeiðsinntøka dettur burtur.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

**2.9. Markaforðingar**
Lógaruppskotið hevur ikki við sær kendar markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um skattir ella avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki heimildir til landsstýrismannin, stovn undir landsstýrismanninum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar kendar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**

*Til § 2 a*

Persónur, sum av heilsumyndugleikunum er settur í sóttarhald, ella har heilsumyndugleikarnir hava mælt persóninum til at fara í sóttarhald, hevur rætt til dagpening vegna sjúku. Hendan ásetingin er sostatt galdandi fyri persónskaran, sum frammanundan er fevndur av løgtingslóg um dagpening vegna sjúku. At fara í sóttarhald orsakað av COVID-19 verður sostatt javnsett við at vera sjúkur. Hevur persónur longu fingið staðfest COVID-19, er hann sjúkur og hevur harvið rætt til dagpening sbrt. reglunum í § 2.

Persónur, sum móttekur fólkapensjón ella er fyltur 70 ár, og sum fær staðfest COVID-19, sum av heilsumyndugleikunum er settur í sóttarhald, ella har heilsumyndugleikarnir hava mælt persóninum til at fara í sóttarhald, hevur rætt til dagpening vegna sjúku. Ásetingin fevnir um pensjonist, sum ikki hevur rætt til løn undir sjúku.

Dagpeningaveitingin til fólkapensjonist verður roknað á sama hátt sum hjá løntakara, sum ikki er fólkapensjonistur. Tó er hægsta dagpeningaveiting 500 kr. um dagin, íroknað frítíðarløn. Pensjonisturin hevur ikki rætt til eftirlønargjald aftrat dagpeningaupphæddini.

*Til § 2 b*

Privatur arbeiðsgevari, sum hevur fólk í starvi, sum hava rætt til løn undir sjúku, hevur rætt til at fáa afturrindaðar lønarútreiðslur fyri persón, sum ikki er til arbeiðis, tí hann er smittaður við COVID-19, ella tí hann av heilsumyndugleikunum er settur í sóttarhald, ella har heilsumyndugleikarnir hava mælt viðkomandi til at fara í sóttarhald.

Tað er ikki ein treyt, at tað einans eru løntakarar, sum eru fevndir av afturrindanarskipanini sbrt. § 2 b. Við ásetingini verður persónskarin, sum er fevndur av serligu afturrindanarskipanini, víðkaður, soleiðis at privatur arbeiðsgevari eisini kann fáa endurrindað lønarútreiðslu til stjóra. Hetta verður gjørt við at víkja frá ásetingini í § 3, stk. 1.

Er tað annar persónur, sum starvast í fyritøkuni, sum ikki kemur undir at vera starvsfólk, er viðkomandi eisini fevndur av ásetingini. Nevndarlimur er ikki at rokna sum starvsfólk.

Upphæddin, sum verður afturrindað, verður roknað, eins og dagpeningur verður roknaður sambært § 8, stk. 1-3. Hægst møguliga gjald er svarandi til eina upphædd, sum viðkomandi hevði havt rætt til, um hann leyk treytirnar annars í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku.

Privatur arbeiðsgevari, sum rindar løn undir sjúku, kann eisini fáa afturrindað lønarútreiðslu til fólkapensjonist. Afturrindanin verður roknað á sama hátt sum hjá øðrum starvsfólki, tó verður í mesta lagi afturrindað upp til 500 kr. um dagin íroknað frítíðarløn.

Tá talan er um mánaðarlønt, kann arbeiðsgevari brúka seinast útgoldnu mánaðarlønina sum inntøkugrundarlag. Hetta verður gjørt fyri at lætta um fyrisitingarliga hjá teimum arbeiðsgevarum, sum skulu lata Almannaverkinum upplýsingar um lønarútreiðslur í sambandi við COVID-19.

Afturrindan til arbeiðsgevara fyri lønarútreiðslur til persón, sum hevur rætt til løn undir sjúku, er ikki galdandi í teimum førum, har tað er gjørligt at røkja arbeiðið heimanífrá. Í hesum

sambandi er tað ikki faktiska tímatalið, sum tað ber til at arbeiða, ella vavið av arbeiðsuppgávum, sum er avgerandi fyri, um arbeiðsgevari hevur rætt til afturrindan. Tað, sum hevur týdning er, at tað ber til at arbeiða heimanífrá.

At heilsumyndugleikarnir sbrt. hesi løgtingslóg seta í sóttarhald ella mæla til at fara í sóttarhald skal skiljast soleiðis, at persónur av myndugleikunum hevur fingið boð um ella tilmæli um sóttarhald, ella hevur fingið boð frá persóni, ið av myndugleikunum er biðin at geva boðini víðari.

Arbeiðgevari váttar á umsóknarblaði (samanber § 23 a), at starvsfólkið hevur boðað arbeiðsgevaranum frá, at tað av heilsumyndugleikunum er sett í sóttarhald, ella heilsumyndugleikarnir hava mælt til at fara í sóttarhald. Starvsfólkið hevur ábyrgd skjótast gjørligt at boða arbeiðsgevaranum frá, um tað verður sett í sóttarhald ella er mælt til at fara í sóttarhald.

*Til § 10 a*
Fyri at fáa rætt til afturrindan frá 1. fráverudegi, skal Almannaverkið hava móttikið umsókn frá arbeiðsgevara í seinasta lagi 90. dagin eftir fyrsta fráverudag. Verður umsóknin móttikin seinni enn hetta, verður afturrindan bert játtað frá móttøkudegnum.

*Til § 17 a*
Persónur, sum letur inn umsókn um upptøku í sjálvbodnu tryggingina, kann fáa útgjald dagin eftir, at umsóknin er latin inn, um so er, at viðkomandi er óarbeiðsførur orsakað av COVID-19.

Treytin, at persónur skal vera arbeiðsførur, sum letur inn umsókn um sjálvbodna trygging, er ikki galdandi í teimum førum, at óarbeiðsførið skyldast COVID-19. Hetta er bæði galdandi fyri tann, sum hevur fingið smittuna og fyri tann, sum av heilsumyndugleikunum er settur í sóttarhald, ella har heilsumyndugleikarnir hava mælt viðkomandi til at fara í sóttarhald.

Vanligu treytirnar um upptøku í tryggingina eru framvegis galdandi. Lógarbroytingin víðkar sostatt ikki persónskaran, og vanligu heilsutreytirnar eru óbroyttar.

*Til § 20 a*
Útreiðsla til dagpening, sum verður veittur í sambandi við COVID-19, bæði til teirra, sum eru smittað, og teirra, sum eru í sóttarhaldi, verður hildin av landskassanum frá 1. fráverudegi. Tað vil siga, at arbeiðsgevarar í hesum málum ikki rinda fyri 1. og 2. fráverudag.

*Til § 23 b*
Í sambandi við dagpening, sum verður veittur sambært § 2 til persón við COVID-19, § 2 a og afturrindan til arbeiðsgevara sambært § 2 b, er ein váttan frá arbeiðsgevara javnsett við læknaváttan. Váttanin frá arbeiðsgevara skal verða gjørd á serligum oyðublaði, sum verður flýggjað frá Almannaverkinum. Almannaverkið kann tó biðja um læknaváttan, um tað verður mett neyðugt, t.d. í sambandi við stakroynd.

**Til § 2**
Gildiskoma

Við hesum er ásett, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. Tó hevur løgtingslógin virknað frá 1. september 2020. Tað merkir, at løgtingslógin er galdandi fyri umsóknir um dagpening vegna sjúku ella afturrindan longu frá 1. september 2020. Somuleiðis fær sjálvstøðugur vinnurekandi møguleika at tekna trygging frá 1. september 2020.

Løgtingslógin kann setast úr gildi aftur við kunngerð.

Umsókn kann tí fevna um tíðarskeiðið frá 1. september 2020 og fram til, at løgtingslógin fer úr gildi aftur. Samstundis ásetir stk. 2, at umsóknir, sum antin ikki eru latnar inn, áðrenn løgtingslógin fer úr gildi aftur, ella sum ikki eru liðugt viðgjørdar, framhaldandi skulu viðgerast eftir reglunum í hesum lógaruppskoti.

Almannamálaráðið, 1. september 2020

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
landsstýrismaður

/Eyðun Mohr Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur